## Fekk Mercedes fyri at vaska skógvar



Í Onglandi er skikkur, at ein fótbóltslærlingur fær ábyrgd av einum av fyrstaliðs spælarunum. Tað vil siga at reinsa fótbóltsskógvarnar og annað líknandi. Tað er ikki óvanligt, at fótbóltslærlingar, eftir eitt langt kappingarár, vóna at fáa eina troyggju sum souvenir. Ella kanska eitt brúkt par av fótbóltsskóm. Fótbóltslærlingurin í Birmingham City, James McPike, hevur hetta kappingarárið havt til uppgávu at vera »boot boy« hjá fronsku stjørnini Olivier Kapo, men hann visti ikki hvat hann skuldi trúgva, tá hann spurdi Kapo, um hann kundi fáa eitt brúkt par av fótbóltsskóm og í staðin fekk tveittar lyklarnar til ein Mercedes. Og hartil fekk hann at vita, at hann skuldi eiga hann. Orsøkin var eftir øllum at døma tann, at Kapo hevði tikið skógvarnar heim við, men franski miðvallarleikarin læt ikki 17-ára gamla McPike fara tómhentan í summarfrí. So í staðin gav hann dreinginum Mercedes'in hjá sær. Tá McPike, sum forvinur 1200 pund um mánaðin, ivaðist í, um hann hevði ráð at gjalda trygging fyri ein so fínan bil, insisteraði Kapo upp á at gjalda tryggingina eitt ár fram. So tað má sigast, at tað ikki er eiti á souvenir at fáa eftir kappingarenda. Og tað enntá eftir, at felagið flutti niður, skrivar Daily Mail.

# Føroysk gransking sett á heimskortið

**Helgi Nolsøe, granskari á Fiskirannsóknarstovuni, fer í morgin á stóra bio-ráðstevnu í Kina, har hann skal halda ein fyrilestur. Hetta hendir eftir innbjóðing frá samskiparanum av ráðstevnuni**



*Helgi Nolsøe, granskari á Fiskirannsóknarstovuni, fer til Kina í morgin at halda fyrilestur á stórari bioráðstevnu*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

GRANSKING
*Leo Poulsen*
*leo@sosialurin.fo*

»Dear Dr. Helgi Nolsoe, On behalf of the Organizing Committee – China Medicinal Biotech Association, we cordially invite you to give a lecture at BIT Life Sciences' 1st Annual World Congress of ibio-2008, a dedicated event on Industrial Biotechnology, which will be held on May 18, 2008 in Hangzhou, China«.

Soleiðis ljóðaði byrjanin til innbjóðingina, sum Helgi Nolsøe ein dagin í februar fekk frá kinversku fyrireikarunum av einari bioráðstevnu, sum verður hildin í Kina í døgunum 18. til 21. mai.

Talan er um eina rættiliga stóra ráðstevnu yvir fleiri dagar, og hon viðgerð evnir sum bio-brennievni, enzymir, mikrobiologi, heilivágvørur, umhvørvi, sjógv, landbrúk og føði.

Helgi Nolsøe skal halda ein fyrilestur á ráðstevnuni, og í skránni stendur hann at halda hann 21. mai millum klokkan 14.20 og 14.45.

At ein føroyingur er boðin við til hesa fyrstu ráðstevnuna av sínum slag í Kina kann undra. Men alt hevur sína frágreiðing.

- Eg hevði eina grein í »International Journal of Food Science and Thechnology«, sum umrøddi ein nýggjan hátt at framleiða surimi, sum gevur eina munandi størri úrtøku. Kina er heimsins størsti framleiðari av surimi, so tað er helst orsøkin til, at eg eri boðin við, sigur Helgi Nolsøe.

### Herðaklapp

Granskarin á Fiskirannsóknarstovuni er fegin um hendan spennandi møguleikan. Ikki bert at halda ein fyrilestur á eini slíkari ráðstevnu, men eisini at talan er um eitt so fjarskotið land sum Kina.

Tá tú ferðast so langan veg er púra náttúrligt, at gera sær dælt av møguleikanum og taka nakrar dagar eyka á staðnum, og tað ger Helgi Nolsøe eisini. Hann fer úr Føroyum í morgin, fríggjadag og verður heima aftur mánadagin 26. mai.

- Men tað tekur langa tíð at ferðast. Eg fari í morgin, men eri ikki komin upp á pláss fyrr enn leygarkvøldið, sigur Helgi Nolsøe.

Fyrilesturin fer sjálvandi at snúgva seg um framleiðslu av surimi, hvussu úrtøkan betrast og framleiðsla úr feitum fiski.

Kina er heimsins størsta fiskivinnutjóð og heimsins størsti framleiðari av surimi, so tað verður spennandi at halda hendan fyrilesturin, sigur Helgi Nolsøe.

Tað má sigast, at tá ein føroyingur verður boðin við til eina slíka ráðstevnu, so setur hetta veruliga føroyska gransking á heimskortið.

- Hetta er ein viðurkenning og eitt herðaklapp til føroyska gransking, sigur Helgi Nolsøe, sum hevur granskað nógv í framleiðslu av surimi.

## Fólkatalið stendur í stað



*Eingin vøkstur hevur verið í fólkatalinum seinastu árini*

Fólkatalið kom 1. apríl 2008 upp á 48.547. Hetta er aðru ferð at fólkatalið fer upp um 48.500, seinast var í august í fjør. Seinastu fýra árini hevur fólkatalið verið mest fyrst í august mánaða, men er longu í september minkað aftur við fleiri hundrað, tí netto fráflytingin er størst í august.

Um vit síggja burtur frá hesum árligu sveiggjunum, er tað samanumtikið lítil og eingin vøkstur í fólkatalinum longur. Hetta kemur klárt fram, um vit rokna miðaltalið av undanfarnu 12 mánaðunum. Eftir hesum at døma leggjast ikki meira enn eini hundrað fólk aftrat um árið, ella minni enn eitt hálvt prosent. Vit kunnu siga, at fólkatalið nú í næstan fýra ár hevur staðið í stað, skrivar Hagstova Føroya á heimasíðu síni.